# Um drunnhvíta



Drunnhvíti eitur á latíni *Hydrobates pelagicus*

Drunnhvíti eigur ymsastaðni í Føroyum, tó mest í Urðini í Nólsoy. Summi halda, at ongastaðni í heimi er so nógvur drunnhvíti til sum har.

Drunnhvíti er flytifuglur. Í Føroyum eru um 30.000 drunnhvítar ringmerktir, og tí vita vit, at teir halda til á havinum uttanfyri Suðurafrika.

Drunnhvíti er sum grátítlingur til støddar og er millum minstu fuglar, ið liva úti á havi. Hann er 16 cm til longdar, flogið er 37 cm, og hann vigar um 27 g. Hann er svartur um allan kroppin uttan á drunninum, sum er hvítur, og tí navnið "drunnhvíti".

Føðin hjá drunnhvíta er millum annað djóraæti, smáir fiskar og høgguslokkar. Eins og annar skrápsfuglur verjir drunnhvítin seg við at spýggja eftir tí, ið kemur ov nær.

Drunnhvítin verpur eitt egg um ólavsøkutíð. Tá pisan er sjey vikur gomul, rýma foreldrini. Tá er pisan so feit, at hon ikki kann fara á flog. Eftir 10-12 døgum er hon tó lætnað so mikið, at hon kann fara úr reiðrinum og halda leiðina suður til Afrika.

Rottan er ringasti fíggindin hjá drunnhvíta.

